# Vælkomin á Bátastevnu



Vestmanna Kommuna • Tel. 770 100 • www.vestmanna.fo • vestmanna@vestmanna.fo


# Siglandi og syngjandi omma

**VESTMANNA** Á Bátastevnuni verður skipað fyri stórari barnakonsert í Ítróttarhøllini í Vestmanna fríggjadagin 14. mai við góðum tónleiki, undirhaldi og nógvum stuttleika.



Tað fer neyvan at ganga heilt stillisliga fyri seg hendan dagin.

Trølla Omman og Trølla Pætur ætla sær nevniliga at taka alla ta lívligu og herligu trøllafamiljuna við til Vestmanna. Harafturat verða nýggjar frískar Kular Røtur at hoyra og síggja á stevnuni.

Skipað verður fyri móttøku og nógv verður gjørt burturúr, tá trøllini koma til Vestmanna hendan dagin.

– Tað er bátastevna, so sjálvandi ætli eg mær at sigla til Vestmanna, sigur omman, sum tó ikki vil avdúka um hon kemur til bygdini í einum lítlum árabáti, í gomlum fiskifari ella við sjórænaraskipi.

Kortini frættist, at tað verður bæði leikur og kampur rundanum Trølla Ommuna og Trølla Pætur, tá ið tey koma til Vestmanna hendan dagin. Trølla Omman væntar, at børn úr øllum Føroyum fara at taka ímóti henni á bryggjuni, soleiðis at hetta kann gerast ein ógloymandi løta. Eisini vónar Omman, at tað verður ein stór og festlig skrúðgonga, við eini rúgvu av børnum, frá keiini niðan í høllina, har stóra konsertin verður.

Tað eru nógv ár síðani Trølla Omman var í Vestmanna, og tí lovar Omman eitt ordans rock and roll brak hesaferð.

*snorri@sosialurin.fo*

# Stevna saman til kapping



*Stórur áhugi er fyri fiskikappingini. Og sum sæst á myndini er veiðan ikki at kimsa við*

Undan bátastevnuni skipa Fisking & Frítíð fyri fiskikapping á vøtnunum við Lómundaroyru, nakað omanfyri Vestmanna.

Seinastu árini hava Fisking & Frítíð bjóðað fisking á vøtnunum.

– Av tí at undirtøkan fyri fiskingini hevur verið so stór, verður skipað fyri fiskikapping undan stóru bátastevnuni, verður sagt.

Lagt verður aftrat, at bæði útlendingar og føroyingar hava góðar royndir við fisking á staðnum.

Kappingin byrjar fríggjakvøldið kl. 18 og endar leygardagin kl. 12.

Upplýst verður, at byrjað verður at viga fongin kl. 11 leygardagin.

Tríggir teir størstu fiskarnir hjá hvørjum luttakara verða vigaðir.

*snorri@sosialurin.fo*